# Hondbóltskappingarári› fekk ein frálíkan enda

*Leygarkvøldi› 8. apríl var endaligi endabresturin í føroyskum hondbólti hildin úti á læraraskúlanum*



HEINI Í SKORINI

Ikki kann sigast anna›, enn at eitt væleydna› hondbóltskappingarár fekk ein frálíkan enda. Stór veitsla var› hildin úti á Læraraskúlanum í Havn, og til bor›haldi› vóru uml. 180 fólk, men tá lei› út ímóti náttini, komu meir og meir fólk út á Læraraskúlan. Øll vóru í fínasta stási, og lagi› var gott frá byrjan til enda. Veitslan byrja›i klokkan átta, og hon var› ikki li›ug, fyrr enn ta› lei› út ímóti morgni. Fyriskipararnir lata sum sagt sera væl at kvøldinum, og ein av fyriskiparunum, Turid Samró sigur, at hetta kundi ikki veri› ein betri endi uppá eitt so gott kappingarár. Hon leggur afturat, at ta› var sangur og rómur frá byrjan til enda, hóast veitslan byrja›i klokkan átta, og enda›i uml. klokkan seks á morgni.

## Vir›islønir handa›ar

Leygarkvøldi› vór›u eisini vir›islønir handa›ar fyri ársins leikarar og bestu toppskjúttar hjá kvinnum og monnum. Ingi Olsen úr VÍF gjørdist ársins leikari, og hetta kom ikki so dátt vi› hjá øllum. Ingi hevur spælt framúrskarandi væl í ár, eins og hann hevur gjørt und-anfarin hjá VÍF, og at Ingi vann, var fult uppibori›, hóast a›rir eisini vóru heitir kandidatar at fáa tann hei›ur at gerast ársins leikari.

Hjá kvinnunum kom heldur ikki dátt vi›, at Jugoslavin Vesna Tomajek fór avsta› vi› vir›islønini sum ársins leikari. Hon hevur saman vi› ø›rum gingi› á odda bæ›i í Stjørnuni og í føroyskum kvinnuhondbólti í ár, og hon eigur stóran hei›ur í, at Stjørnan streyk avsta› vi› føroyameistaraheitinum. Eisini her vóru fleiri kandidatar til at vinna, men eins og Ingi Olsen, hev›i hon fult uppibori› henda hei›ur.

Eisini vóru vir›islønir handa›ar toppskjúttunum hjá kvinnum og monnum, og her vóru ta› Heini Joensen úr Neistanum og Iona Rapa úr VÍF. Heini Joensen stó› fyri bestu detaljuni leygarkvøldi›. Tá hann hev›i vunni›, og skuldi siga nøkur or›, takka›i hann li›felaga sínum Áka Olsen, sum bert var eitt mál aftanfyri á toppskjúttaralistanum, tí í sí›sta dystinum móti VÍF, hendi ein sera stuttlig hending. Neistin fekk brotskast í endanum á dystinum, tá var dysturin mestsum avgjørdur, og venjarin hjá Neistanum vildi hava Áka Olsen at taka brotskasti›, tí Heini Joensen hev›i nevniliga brent eitt brotskast frammanundan í dystinum. Men Áki visti, at teir lógu javnir á toppskjúttaralistanum, og gav sí›ani Heina bóltin. Eftir álítandi keldum seg›i Áki vi› Heina, at hann kundi taka brotskasti›, tí at hann, Áki, hev›i so ofta fingi› tann hei›ur at gerast toppskjútti. Tí lat Áki Heina taka brotskasti›, Heini skora›i, og sostatt gjørdist Heini Joensen toppskjútti í ár.





Heini takka›i leygarkvøldi› li›felaga sínum fyri hetta, og tá hann hev›i fingi› steypi› sum ársins toppskjútti, fór hann yvir til Áka, og gav honum blómutyssi sum hann sjálvur hev›i fingi› frammanundan.

## Kári Mortensen hei›ra›ur

Vanliga vera bert vir›islønir fyri ársins leikarar og ársins toppskjútta handa›ar, men ein onnur hei›ursløn var eisini handa, og var ta› til ongan annan enn Kára Mortensen, sum nú er 45 ára gamal. Hóast Kári er 45 ár, hevur hann aftur í ár spælt í bestu deildini, og hann fekk hesa hei›ursløn fyri at hava tænt hondbóltinum í so nógv ár. Eingin annar hondbóltsleikari hevur spælt so leingi á so høgum stø›i sum Kári Mortensen, og hei›urslønina hann fekk leygarkvøldi›, hevur hann so dyggiliga uppibori›.

Ikki kann sigast anna›, enn at eitt sera spennandi, vælleikt og og gott kappingarár, fekk ein frálíkan enda, og sostatt var› lok lagt á kappingina í ár vi› hugnaliga og væleydna›a kvøldinum leygarkvøldi›. Fyriskipararnir úr H71 ynskja at takka øllum sum vóru vi› til at gera veitsluna møguliga, fyri stu›ulin og fyri gó›a undirtøku.







## Atkvø›ugrei›slan

**Komandi stjørnan**
Kvinnur:
1. Guri› Mortensen, VB
2. Rannvá Augustinussen, VB
3. Jacklyn Durhuus, VÍF

Menn:
1. Janus Einar Sørensen, Kyndil
2. Áki Mørk, Neistin
3. Leivur Justinussen, StÍF

**Ársins verjuleikari**
Kvinnur:
1. Inga Danberg, Neistin
2. Kristina Holm, VB
2. Jórun Ludvig, Kyndil

Menn:
1. Sámal Joensen, VÍF
2. Sjúr›ur Holm, VÍF
3. Hans Á. D. Christiansen, Kyndil

**Ársins áleypari**
Menn:
1. Ioana Rápa, VÍF
2. Vesna Tomajek, Stjørnan
3. Regina Rádó, VB

Menn
1. Ingi Olsen, VÍF
2. Áki Olsen, Neistin
3. Heini Joensen, Neistin

**Ársins málverji**
Kvinnur:
1. Marita Hermansen, Kyndil
2. Helena Dam, Neistin
3. Marjun Poulsen, VÍF

Menn:
1. Hóhan Danielsen, StÍF
2. Óla Chr. Djurhuus, KIF
3. Petur Magnusson, Neistin

**Ásins venjari**
Kvinnur:
1. Vesna Tomajek, Stjørnan
2. René Christiansen, Neistin
3. Regina Rádó, VB

Menn:
1. Hjalmar Klein Olsen, VÍF
2. Sophus Dahl-Christiansen, Kyndil
3. Páll Poulsen, Neistin

**Ársins dómarapar**
1. Dánial Hansen/Kári Hansen, Tjaldur
2. Hanus Kúrberg/Hans Thomassen, Kyndil
3. Hjalmar Petersen/Kristian Johansen, Neistin

**Ársins toppskjútti**
Kvinnur:
1. Ioana Rápa, VÍF
2. Regina Rádó, VB
3. Lotte Sørensen, Kyndil

Menn:
1. Heini Joensen, Neistin
2. Áki Olsen, Neistin
3. Sámal Joensen, VÍF

**Ársins leikari**
Kvinnur:
1. Vesna Tomajekl
2. Katrin á Neystabø
2. Ioana Rápa

Menn:
1. Ingi Olsen
2. Kári Mortensen
3. Heini Joensen